# Bíbilsku skriftirnar

## 1. Lógartekstur

| Er brotið um: | Dømi: |
|---|---|
| • siðareglur, atferð? | 2. Mós 20 |
| • samfelagslig lóg, ríkislóg? | 3. Mós 25,13 |
| • familjulóg, reinføri? | 3. Mós 12 |
| • átrúnaðarlig lóg, tilbiðjan, offur? | 3. Mós 1-7 |
| • signing og banning | 5. Mós 28 |

## 2. Søguligar bøkur

| | Dømi: |
|---|---|
| • Hvat var søguliga grundarlagi í brotinum | Ezra 1,1, Luk 2,1-2, Luk 3,1-2 |
| • Hvat hendi og hvar? Hvørji fevnir hetta um? | Neh 1, Jes 36 |
| • Ofta skuldi áherðsla leggjast á okkurt ávíst. Verður hetta staðfest, ella er tað undirskilt? | Dóm 1, 6, 7, 8 |

## 3. Poesi

| | Dømi: |
|---|---|
| • Er hetta leikur við luttakarum sum í leiki? Ella skaldskapur á bundnum máli, ið vísir kenslurnar hjá einum, vit hava samkenslu við? | Sl 42, 29, 68 |
| • Er hetta ímyndalig tala? Er málið rituelt ella frá søgu Ísraels? Um so er, hvat vísir hetta til? | Sl 77, 78, 79 |
| • Er umhvørvið søguligt, og hjálpir hetta okkum at skilja yrkingina? | Dóm 4-5 |
| • Ella var hetta skrivað til gudsdyrkan? | Sl 134, 136 |
| • Eru endurtøkur ella mótsetningar, ið seta dám á frásøgnina? | Sl 67, Orðt 10,11 |

## 4. Vísdómsorð

| | Dømi: |
|---|---|
| • Er hetta orðatak, ið stendur einsamalt, ella er hetta felags umrøðuevni? | Orðt 8<br>Orðt 23,13-14 |
| • Er hetta skemtilig viðmerking til lívið? | Orðt 25,24 |
| • Ella staðfesting av, hvat alment er galdandi? | Orðt 10,1-4 |
| • Ella vísir hetta menniskjans støðu uttan Gud? | Præd |

## 5. Profeti

| | Dømi: |
|---|---|
| • Hvat var søguliga grundarlagi? | Dán 1,1 |
| • Verður myndatala nýtt? Um so er, hvaðani er myndatalan? | Dán 7 |
| • Hvat var uppruna endamálið við spádómum? | Jes 30,1-5 |
| • Hvør alheims grundregla er heft at hesum spadómum? | Jes 53 |
| • Verður staðfest í Nýggja Testamenti, at spádómurin er gingin út? | Áps 8 |

## 6. Líknilsi

- Vórðu líknilsini søgd fyri at svara spurningi ella fyri at lýsa eitthvørt sjónarmið?
  Dømi: Luk 10,24-37; 2. Sám 12,1-5

- Hvør var høvuðstátturin?
  Luk 10,36-37

- Fáa staklutir pláss í frásøgnini, ella eru hesir bert partar av frásøgnini?
  Mark 4,1-20; Luk 14,15-24

## 7. Brøvini

- Hvat var endamálið við brævinum?
  Dømi: 1. Jóh 4,13

- Hvørjum er tað ætlað?
  1. Kor 1,1-2

- Hvør er hugsanarhátturin ella aðaltátturin í hesum brævi? Hvussu hóskar hetta brotið í hesum sambandi?
  Gal 1,6